# Skipaeftirlitsfólk og løgfrøðingur

Føroya Landsstýri

Av tí at feilur áður var í hesi lýsingini, verður umsóknarfreistin longd til 10 oktober. Er nú rættað. Umsóknir, ið longu eru móttiknar, eru framvegis galdandi.

Til tess at optimera raksturin av manningareindini á Skipaeftirlitinum, verður søkt eftir tveimum starvsfólkum, einum skipaeftirlitsfólki og einum løgfrøðingi

**Skipaeftirlitsfólk:**
Skipaeftirlitið er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum.
Starvið inniber í høvuðsheitum hesar upppgávur:

· Umsiting og málsviðgerð av lóggávu, ið knýtir seg at manningarviðurskiftum, undir hesum:
- at fyrireika manningarskjøl til fiskiskip, farmaskip og ferðamannaskip
- at hava umsjón við mynstringum og viðurskiftum, sum knýta seg at mynstring sum t.d. at føroyskir sjómenn lúka krøvini til førleika á skipunum teir sigla við
- málsviðgerð av vinnubrøvum, undir hesum málsviðgerð av vinnubrøvum hjá útlendskum sjómonnum, sum sigla við føroyskum skipum
- luttaka í fyrireikingararbeiðið til lógarsmíð
- at hava eftirlit og umsita viðurskiftini, sum eru staðfest í STCW konventiónini og ILO konventiónum, ið knýta seg at manningarviðurskiftum á skipum
- samstarv við vinnuna og aðrar myndugleikar.

**FØRLEIKAKRØV:**
Hann, ið settur verður, má hava áhuga í og førleika til væl og virðiliga at gera seg kunnugan við løgfrøði og tær fyriskipanir, ið knýta seg at manningarviðurskiftum og skiparakstri annars.

Til starvið krevst viðkomandi útbúgving sum t.d.:
- skipsførari
- maskinmeistari
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- telduførleiki á brúkarastøði
- at arbeiða við verkætlanum
- góð samstarvsevni

Harumframt er kunnleiki til góðskustýring (kvalitetsstýring) ein fyrimunur.
Í starvinum er møguleiki at fáa eftirútbúgving innan viðkomandi arbeiðsøki.

**Løgfrøðingur:**
Starvið inniber í høvuðsheitum hesar upppgávur:
- umsiting og lógarsmíð av lóggávu, ið knýtir seg at manningarviðurskiftum, og tryggja at føroysk lóggáva til eina og hvørja tíð lýkur ásetingarnar í galdandi altjóða konventiónum
- tulking av altjóða sáttmálum
- taka sær av fyrisitingarligum og løgfrøðiligum málum á Skipaeftirlitinum
- viðgerð av kærum
- umsiting av avtalum við aðrar flaggstatir
- luttaka í fyrireikingararbeiði til Fráboðanir frá Skipaeftirlitinum
- hava eftirlit við- og umsita viðurskiftini, sum eru staðfest í STCW konventiónini, ILO konventiónum og øðrum konventiónum, ið knýta seg at manningarviðurskiftum á skipum
- samstarv við vinnuna og aðrar myndugleikar.

**FØRLEIKAKRØV:**
Hann ið settur verður, skal hava løgfrøðiligt embætisprógv.
Harumfarmt má viðkomandi persónur hava áhuga til væl og virðiliga at gera seg kunnugan við tær fyriskipanir, ið knýta seg at skiparakstri undir hesum serliga manningarviðurskiftum
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- telduførleiki á brúkarastøði
- góð samstarvsevni

Í starvinum er møguleiki at fáa eftirútbúgving innan viðkomandi arbeiðsøki

**SETANARTREYTIR:**
Skipaeftirlitisfólkið verður lønt í lønarflokki 8 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starsvsmannafelagið, ella í lønarflokki 12 millum Fíggjarmálaráðið og Makinmeistarafelagið. Aftrat lønini verða veittar kr. 3000,- um mánaðin, sum viðbót fyri 35 tímar álagda yvirtíð triðja hvønn mánaða.

Løgfrøðingurin verður løntur sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelagið (BLF).

Fyri bæði størvini er galdandi, at setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Skipaeftirlitið í Miðvági.
Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**UMSÓKNIR:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Skipaeftirlitinum í hendi í seinasta lagi 10. oktober 2006, kl. 14.30.

Umsóknir skulu sendast til:

**Skipaeftirlitið**
Postmoga 26, 370 Miðvágur

*Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Skipaeftirlitið á tlf. 355600 og tosa við Óla Hans Hammer Olsen, deildarstjóra.*

Lesið Sosialin - so eru tit við

## Skurtíð og burturkast

IRF

**Borgarar**
í limakommunum kunnu koyra skinn, innvøl og aðrar leivdir av skurðinum á bingjuplássið í kommununi.

Vemburnar skulu vera tómdar.

Saltið skal vera rakað av saltaðum skinnum

Koyr alt skurburturkast í bingju til burturkast, sum skal brennast.

**Vinnurekandi**
garðar og slaktarar skulu venda sær til IRF viðvíkjandi móttøku av burturkasti frá skurðinum.

Víst verður eisini til:
www.irf.fo og
IRF kalendaran 2005

IRF



## Svimjihøllin í Klaksvík

Í heystfrítíðini hava vit opið týsmorgun til fríggjamorgun frá klokkan 07.00 til klokkan 10.00. Hinar tíðirnar eru sum tær plaga at vera. Vatnið er heitari enn vanligt.

Bilettsølan stongir klokkan 10.00 og tú skalt vera úti klokkan 11.00

SVIMJI HØLLIN

Klaksvíkar Svimjihøll · N. Pálsg. 32 · 700 Klaksvík · tlf 456037

THOR

**P/F THOR** takkar øllum starvsfólkum, viðskiftafólkum og veitarum fyri góð ynskir og blómur í samband við, at felagið varð kosið til ársins virki 2006.